# Nýggja dagpeningaskipanin komin undir land

*Ein arbeiðsbólkur undir Almanna- og Heilsumálastýrinum er nú liðugur við tilmæli til nýggja dagpeningaskipan*

JOHN JOHANNESSEN

Fyrradagin skrivaði seinasti limurin í arbeiðsbólkinum hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum undir tilmælið til nýggja dagpeningaskipan.

Tilmælið er latið landsstýriskvinnuni.

Jóhan Hendrik Svabo Samuelsen, ið hevur verið formaður í arbeiðsbólkinum, vísir á fleiri fyrimunir við nýggju skipanini, mótvegis teirri gomlu.

Formaðurin vísir á, at nýggja skipanin víðkar um skaran av teimum, ið kunnu fáa útgjald úr skipanini, hóast skipanin ikki, eins og tann núverandi, eisini rindar pening til heimagangandi.

Nýggja skipanin víðkar um skaran á tann hátt, at hon eisini rindar pening, um eitt barn ella hjúnarfelagi er álvarsliga sjúkur. Eftir núverandi skipan verður einans veitt endurgjald fyri miss av egnari inntøku.

Eisini er í tilmælinum skotið upp, at sjálvstøðug vinnurekandi, ið einans hava leysa arbeiðsmegi knýtta at sær, fáa pening úr skipanini. Eftir núverandi skipan ber ikki til at fáa gjald úr skipanini, ert tú sjálvstøðugur vinnurekandi.

Í nýggju skipanini eru nógv umtalaðu karensdagarnir avtiknir. Tilmælið skjýtur upp, at dagpengaskipanin rindar tær pening frá fyrsta sjúkradegi.

Tíðarskeiðið, til ber at fáa útgjald, er sett til 20 vikur í sambandi við sjúku og 24 vikur í sambandi við barnsburð. Harafturat skal bera til at býta tær 24 vikurnar í sambandi við barnsburð ímillum mammuna og pápan.

Nýggja dagpeningaskipanin skal veita eitt útgjald, ið er 80 prosent av miðalinntøkuni seinastu fimm vikurnar. Tó verður ikki veitt meira enn 80 prosent av lønini, ið er avtalað í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Men fyrimunurin við nýggju skipanini er, at hevur tú havt eina inntøku, ið er lægri enn tann í sáttmálanum millum hesi bæði feløg, fært tú endurgoldið 100 prosent av upphæddini, tú hevur vunnið seinastu fimm vikurnar.



*Gomul mynd frá kvinnutiltaki í Mettustovu* savnsmynd

# Bókmentakvøld í Mettustovu

Mánakvøldið tann 21. februar kl. 20 skipar Kvinnufelagið í Havn fyri fundi í Mettustovu, har Bergtóra Hanusardóttir lesur úr bók sínari Suðar dýpið reyða og greiðir frá tí keldutilfari, sum skaldsøgan er sprottin úr.



*Enn ein norskur frystilínubátur verður nú kannaður, um hann hevur ov nógva hjáveiðu* Mynd: Jens Kristian Vang

# Aftur ein norðmaður tikin undir Føroyum

*»Øyliner« var biðin at koma til eftirlitsstaðið klokkan 04 hósmorgunin og verður nú landaður á Havnini. Norski frystilínubáturin hevur roynt á sama stað sum hinir, ið tiknir eru í seinastuni. Kunngerðin um tey 30 prosentini er nú lýst*

ÓLAVUR Í BEITI

Klokkan 04 hósmorgunin var norski frystilínubáturin »Øyliner« hjá vaktrarskipinum »Gorm«, og verður norski frystilínubáturin landaður á Havnini í løtuni. Søgan er tann sama sum viðvíkjandi undanfarnu norsku línubátunum sum royna undir Føroyum at mett verður at »Øyliner« hevur ov nógva hjáveiðu.

Nú er so eingin ivi um hjáveiðuprosentið, tí í kunngerðarblaðnum hósdagin stendur kunngerðin um tey 30 prosentini, men so er spurningurin um klokkutíman tá ið »Øyliner« varð tikin.

## 12 bátar

Tá ið vit tosaðu við Vaktar- og Bjargingartænastuna var ilt at siga, hvussu nógv »Øyliner« hevði í lastini, men tað fæst so neyvt at vita, tá ið báturin er landaður.

Seinastu tíðina hava verið upp í 12 norskir frystilínubátar undir Føroyum og tað er loyvda talið av norskum línubátum. »Øyliner« hevur eisini roynt nakað nógv av tíðini norðan fyri og tí hevði føroyska eftirlitstænastan ein grundaðan mistanka um at hjáveiðan helst var í meira lagi.

Tað eru Fiskiveiðieftirlitið og Skipafelagið sum standa fyri landingini, og vísir tað seg, at hjáveiðiprosentið er omanfyri tað mest loyvda verður mannagongdin tann sama sum í undanfarnu førum at málið verður latið fútanum.

# Sernámsfrøðiliga virksemið fyri børn sum mest á staðnum

*At barnadeildin er minkað burtur í einki, er m. a. eisini ein avleiðing av hugburðinum um, at barnið hevur tað best í heimaumhvørvinum, sigur Signar á Brúnni m.a. í svari sínum viðvíkjandi skúlanum á Trøðni og Sernámsdeplinum*

ÓLAVUR Í BEITI

Rúna Sivertsen var ikki nógv við svarini frá landsstýrismanninum Signari á Brúnni viðvíkjandi skúlanum á Trøðni og Sernámsdeplinum í fyrru spurningum sínum, og tí setti hon 5 nýggjar spurningar til landsstýrismannin, sum Signar á Brúnni hevur svarð uppaftur.

Viðvíkjandi lógargrundarlagnum árini 1990 - 1998, sigur Signar á Brúnni, at hóast heimildirnar til virksemið var og er lógarásett í løgtingslógini um fólkaskúlan, so hevur Skúlin á Trøðni ongantíð verið ein fólkaskúli. Hann er ikki ein kommunalur skúli, og tí ikki stýrdur eftir somu reglum sum ein fólkaskúli, men beinleiðis av fyrisitingini. Reglurnar um heimildirnar hjá skúlanevndum, kommunustýrum, lærararáðum o. s. fr. vóru ikki galdandi fyri skúladeildina í Sernámsdeplinum, sum skúlin verður nevndur í dag.

Viðvíkjandi spurninginum um lógargrundarlagi at leggja Skúlan á Trøðni og Sernámsfrøðiligu Ráðgevingina saman, sigur landsstýrismaðurin, at tað krevst ikki nakað ávíst lógargrundarlag fyri at leggja hesar báðar partarnar saman í eina eind.

Er Sernámsdepilin ein almennur undirvísingarstovnur undir landinum? verður eisini spurt, og til hetta svarar Signar á Brúnni, at skúlin í Sernámsdeplinum er ein serskúli í Sernámsdeplinum, sum er ein stovnur undir landinum.

## Ikki skúlaleiðarastarv

Viðvíkjandi spurninginum um skúlin í Sernámsdeplinum hevur skúlastjóra eins og aðrir skúlar, og hvørjar heimildir hesin hevur, sigur landsstýrismaðurin, at í skúlanum í Sernámsdeplinum er skúlaleiðari, hvørs heimildir ikki eru ásettar í lóg ella kunngerð. Starvið er tí ikki skipað á sama hátt sum eitt skúlaleiðarastarv í fólkaskúlanum. Skúlaleiðarin og stjórin í Sernámsdeplinum eru báðir settir av landsstýrismanninum og eru partar av fyrisitingini. Landsstýrismaðurin kann altíð umvegis stjóran í Sernámsdeplinum taka aftur ella geva skúlaleiðaranum øktar heimildir.

Og at enda spyr Rúna Sivertsen, hví barnagarsdeildin í Sernámsdeplinum er niðurløgd sum viðgerðarstovnur, og viðgerðarskyldan flutt í almannaverkið?

– Tað hevur verið hildið rætt at leggja so nógv sernámsfrøðiligt virksemi fyri børn sum heild úti, har barnið býr saman við foreldrum, og har sum tørvurin er eyðsýndur. Tað er hetta, ið verður gjørt. At barnadeildin er minkað burtur í einki, er m. a. eisini ein avleiðing av hugburðinum um, at barnið hevur tað best í heimaumhvørvinum. Barnagarðsdeildin er ikki ein sjálvstøðugur stovnur, og kann tí minka, veksa, setast á stovn ella verða niðurløgd við eini av landsstýrismanninum tiknari fyrisitingarligari avgerð, svarar Signar á Brúnni at enda spurningunum hjá Rúnu Sivertsen.



*Nátaskipið úr Vági:*

# Arbeiðsplássini eru største gleðin

*– Eingin okkara roknar við at gerast millióningur av hesum, men kunnu vit seta á stovn fimm nýggj - heilt nýggj arbeiðspláss Ì Vági, so er tann gleðin nógv størri enn pengarnir, sigur ein av eigarunum av Maj, sum um nakrar fáar dagar fer at royna eftir vetrarnáta við Føroyar*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað má sigast vera bróta upp úr nýggjum, tá farið verður undir skipaða veiðu eftir vetrarnáta við Føroyar.

Gamaní er tað gamalt, at menn fáa sær eitt kók ella bæði tvey, men soleiðis at fara undir skipaða heilársveiðu eftir vetrarnáta - tað er ikki roynt av føroyingum áður.

Men tað verður tað so nú.

Fimm vágbingar hava, sum nevnt aðrastaðni í blaðnum valt at royna nakað heilt, heilt annað, og ikki kann sigast annað enn at tað er øðrvísið - og spennandi.

## Arbeiði fram um vinningin

Hóast tann stigtakarin, sum Sosialurin hevur tosað við, sigur, at teir fara undir handilsligar royndir eftir vetrarnáta, so er tað kortini ikki týdningarmiklasti parturin av verkætlanini.

– Fyri okkum hevur tað størri týdning at skapa arbeiðspláss í Vági enn at fáa stóran fíggjarligan vinning av verkætlanini. Gleðin at skapa arbeiðsplássini er størri, sigur hann.

Mai, hava teir keypt bíliga - skipið hevði jú einki fiskiloyvi - og hóast teir hava brúkt næstan líka nógv til at tilbúgva skipið, so stendur Mai teimum ikki í meiri enn góðum 700 túsund krónum.

– Vit vóru hepnir, at fáa eitt gott skip fyri ein bíligan penga og tað ger tað eitt sindur lættari at fara undir.

## Bíligur í rakstri

Tá skip fara á fiskiveiðu er vanligt, at tey brúka nógv brennievni meðan tey eitt nú trola. Hesum sleppa eigararnir á Mai undan, tí teir koma at liggja stillir meginpartin av tíðini.

– Vetrarnáti er til í so stórum meingi, at okkum nýtist ikki at sigla alla tíðina fyri at koma á miðini. Tí vera útreiðslurnar til olju ikki so stórar sum hjá øðrum skipum. Hin stóri útreiðslupósturin verður proviantur til teir fimm menninar, sum vera við.

Og hvussu stórur tann posturin verður er ikki gott at vita, leggur hann afturat, tí enn eru teir ikki greiðir yvir, hvussu leingi, teir fara at vera úti í senn.

## Stóran kapasitet

Tað kann, uttan stórvegis trupulleikar, vera í rættuliga drúgva tíð. Báturin hevur ein stóran kapasitet og tá hagreiddi fuglurin samstundis er lítil í vavi, ja, so er laga manni at liggja leingi.

– Nú fáa vit at síggja. Tað skal alt lagast eftir nær tað er best at selja og eisini hvussu ofta tað skal gerast, men hugsa vit um frystikapasitetin, so kann báturin vera ógvuliga leingi úti.

Veiðan verður, sum sagt hagreidd umborð á teirri nýgjørdu »verksmiðjuni« umborð. Fuglurin verður royttur, reinsaður, pakkaður og síðani frystur ein og ein. Áðrenn hann verður seldur verða eini 16-20 vetrarnátar pakkaðir í ein kassa.

Framleiðslan umborð er gjørd eftir forskriftunum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og tað merkir, at framleiðslan og pakkingin fer fram í hvør sínum rúmi.

– Fýra roytingarmaskinur eru settar upp og tær bíða bara eftir at sleppa í gongd. Fjarðarnir fara beint í posar, sum eru settir upp á maskinurnar, so tað verður reinført umborð. Pakningurin skal eisini goymast fyri seg, men alt tað er í lagi, sigur vágbingurin, sum leggur afturat, at teir eisini máttu gera broytingar, sum Skipasýnið kravdi.

– Men vit hava valt, at gera alt samsvarandi reglunum frá byrjan, so vit ikki skulu fara afturumaftur.

## Forkunnugt virksemi

Tá vágbingarnir eru farnir til verka, er tað, sum sagt nátaveiðan, sum verður høvuðsálitið hjá nýggja virkinum. Men fyri at fáa alt at hanga saman fíggjarliga er ætlanin at hava eyguni eftir lomviga úr Íslandi, brugdu og øðrum, sum kanska kann vera ískoyti til raksturin.

Í heila tikið verður talan um ein rakstur, sum er settur saman av so forkunnugum virksemi, sum sjáldan sætt í nýggjari tíð í Føroyum.

– Lomvigan kunnu vit keypa onkur ár úr Íslandi, tí viðhvørt fáa teir nógv av honum. Vit fara ikki at veiða lomviga við Føroyar og so slettis ikki ólógliga.

Hetta skal ganga rætt fyri seg, sigur vágbingurin.

– Men tað, sum kanska hevði verið heppið var, um vit kanska fingu onkrar hvalateljingar og fuglateljingar at gera meðan vit liggja úti. Tað fer jú at bera til uttan at órógva. Báturin fer at liggja nógv á somu leið.

Avroyttu fjarðarnir væntar hann tó ikki nakað kann fáast burturúr. Tað verður savnað saman og koyrt í land, tá báturin kemur inn.

## Fimm mans vera við

Tá Mai fer fyrsta túrin vera fimm mans við. Tríggir av eigarunum vera umborð, meðan tveir aðrir eisini fáa kjansin.

Einki er greitt frammanundan hvussu teir skulu avroknast, men ikki er óhugsandi at teir fáa fasta løn fyrstu tíðina, til tað ber til at síggja hvussu tað fíggjarliga hongur saman.

– Tað vera bara teir, sum vera umborð, sum fáa løn. Hinir eigararnir fáa einki. Fyrstu tíðina verður nokk talan um fasta løn. So mugu vit fáa at síggja, hvussu leikur fer.

Og teir fimm menninir fáa sítt at síggja til, tí ætlanin er, at teir skulu hagreiða 500 nátar um dagin.

– Tað verður tað so ikki í byrjanini, men tað høvdu vit hugsað okkum við tíðini, sigur vágbingurin, sum er sera spentur upp á hvussu tað fer at gangast.



*Tær fýra roytingarmaskinurnar eru klárar umborð á Mai og bíða nú eftir nátunum ...*

Mynd: Jens Kristian Vang

## Fakta um




*Mynd: Skipalistin 2000*

| | |
|---|---|
| **Bygdur:** | á Thurø Værft í Danmark |
| **Byggiár:** | 1947 |
| **Nøvn:** | Selberg og Mai |
| **Stødd:** | 97,78 BRT |
| **Mát:** | L: 24,95 m, B: 6,62, D: 2,76 |
| **Motorur:** | Grenaa Diesel 5s, 4t 368kW/500HK |
| **Heimstaðir:** | Bygdur til Sørvágs í 1947 og kallaðist Selberg. Karl Gaardlykke keypti bátin frá sørvingum í 1962 til Saltangará og gav honum navnið Mai. Petur Anker Gaardlykke keypti bátin til Vágs í 1982. Seldur til Miðvágs í sambandi við keypi av West Freezer. Í 1999 keyptur aftur til Vágs, við ongum fiskiloyvi, og skal nú royna eftir vetrarnáta. |

Mai hevur frá byrjan eina serliga søgu, av tí, at skipið er bygt úr serliga stórum tilfarið, sum upprunaliga er ætlað at gera eina skonnart burturúr. Petur Anker Gaardlykke greiðir frá.

»Tá sørvingar lótu skipið byggja á Thurø skuldi ein skonnart smíðast áðrenn. Men eigararnir fóru á heysin áðrenn teir byrjaðu upp á hana, og nú lá skipasmiðjan inni við tilfarinum. Og hóast Mai ikki er nøkur skonnart er hon gjørt úr serliga stórum tilfari.

Harumframt er so tætt ímillum bondini í henni, at tað næstan eru tey beru bond.

Einaferð meðan eg var á veg inn á Runavík við fullari ferð, fór umstýringin, tá eg fara at bakka. Báturin sigldi snórabeint á bryggjuna við fullari ferð. Einasti skaði var, at stevnið fór. Var talan um eitt vanligt skip, so fór tað beint til botns. Eingin ivi um tað.

Skaðin skuldi sjálvandi umvælast, men tað bar næstan ikki til at fáa tilfar til skipið. Á Thurø var einki tilfar, og aðrastaðni her um leiðir var heldur einki. Orsøkin var, at tað var so stórt og ógvusligt, at einki eikitræ av slíkari stødd fanst her um vegir. Til síðst eydnaðist at finna eitt - í Suðuramerika. Tað vigaði trý tons. Men kortini tók tað bert tríggjar vikur til tað lá á bryggjuni í Vági, og so kundi skaðin umvælast.«

**Leiga Tórsvøll**

**Feløg, felagsskapir og einstaklingar...**

*Í tíðarskeiðnum 1. mai til 1. oktober 2000 er møguligt at leiga Tórsvøll til dystir, venjingar og onnur tiltøk.*

*Áhugað kunnu venda sær til:*
*Grunnurin Tórsvøllur*
*Postboks 3121*
*FO-110 Tórshavn*

**Grunnurin TÓRSVØLLUR**